KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 25.02.2021 kl. 17:30

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
13/21	20/01188-45	Val av umboðum í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn
14/21	20/01188-46	Val av tiltakslimi í nevndina fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku
15/21	20/01188-43	Val av formonnum til hvørt fólkatingsvalstað, 2021-2024
16/21	19/00950-42	Uppfylgjan av byggisamtyktarbeiðnum fyri Svínoy
17/21	21/00192-3	Fyrispurningur um sundurbýti av matr.nr. 1580 í Klaksvík
18/21	21/00047-9	Stuðul til dokumentarsending um Læknastríðið - SaxoFilm
19/21	20/00819-14	Áskoðaraskýli við Jógvan Waagsteinsgøtu
20/21	16/00196-102	Spæliland - annullering av sáttmála við arbeiðstakara
21/21	14/00763-51	Liðugtgerð av vælveruøki í Klaksvíkar Svimjihøll
22/21	17/00855-33	Veghæddin Biskupstorg – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
23/21	18/00229-56	Jústabrekka 1 leigast út til AV, meirkostnaður umvæling – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
24/21	21/00009-11	Stovnseting og val av Heilsunevnd sum undirnevnd - *seinna viðgerð*
25/21	21/00152-1	Broyting í kommunustýrisskipanini - rakstrarstaðið "Frítíðarskúlin (Snjallabjalla)" flytast frá FíN til B&U – *seinna viðgerð*
26/21	20/00840-79	Flyta játtan til stuðulskonturnar á trivnaðarøkinum – *seinna viðgerð*
27/21	17/01446-7	Talgildu Føroyar - Klaksvíkar kommuna gerast samstarvsfelagi? – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Málini 19/21 og 22/21 vórðu flutt at viðgera á fundi fyri afturlatnum hurðum

13/21
20/01188-45 Val av umboðum í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	13/21

20/01188-45 Val av umboðum í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundinum 28. januar var val av umboðum í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn á skrá, men málið varð útsett.

Í § 5 í viðtøkunum fyri Norðoya Fornminnasavn er ásett, at allar kommunur í Norðoyggjum eru umboðar í savninum gjøgnum eitt umboðsráð, sum yvirfyri stjórnini og savninum kunnu reisa síni áhugamál viðvíkjandi savnsvirkseminum. Umboðsráðið verður valt soleiðis, at hvør kommuna í Norðoyggjum velur eitt umboð við eykaumboð í ráðið. Umboðini verða vald beint eftir, at bygda- og býráðsval hava verið, og sita tey valskeiðið út.

Klaksvíkar kommuna skal sostatt velja eitt umboð og eitt eykaumboð í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn.

Lógargrundarlag:
§ 5 í viðtøkunum fyri Norðoya Fornminnasavn

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at velja eitt umboð og eitt eykaumboð í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Einmælt samtykt at velja Vár Joensen sum umboð og John Dalsenni Olsen sum eykaumboð í umboðsráðið fyri Norðoya Fornminnasavn.

14/21
20/01188-46 Val av tiltakslimi í nevndina fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	14/21

20/01188-46 Val av tiltakslimi í nevndina fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundinum 28. januar varð valt í ymsar nevndir, harímillum nevndina fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku. Leiðsla sjálvsognarstovnsins er ein nevnd, sum telur seks limir. Klaksvíkar býráð velur tríggjar limir og tríggjar tiltakslimir, og Bústaðir velur tríggjar limir.

Býráðið valdi á fundinum Karl H. Johansen, Gunvá við Keldu og Jógvan Skorheim sum limir í nevndina, meðan Alti S. Justinussen og Signhild V. Johannesen vórðu vald sum tiltakslimir. Av misgáum varð triði

tiltakslimurin ikki valdur á fundinum; fyri at bøta um mistakið verður tí mælt til at velja triðja tiltakslimin - ið fellur býráðsmeirilutanum í lut at velja.

Lógargrundarlag:
§ 4 í viðtøkununum fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku

Tilmæli:
Mælt verður býráðsmeirilutanum at velja triðja tiltakslimin.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Einmælt samtykt at velja Jóhanna C. Christiansen sum triðja tiltakslimin í nevndini fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku.

15/21
20/01188-43 Val av formonnum til hvørt fólkatingsvalstað, 2021-2024

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	15/21

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundinum 28. januar 2021 vórðu limir valdir í valstýrini fyri (býráðs-, løgtings- og) fólkatingsval.
Tíverri var gloymt at velja forkvinnur/-menn fyri hvørt *fólkatingsvalstað* sær, sum ásett í lógarkunngerðini.

Valstýrini fyri fólkatingsvalstøðini eru:
- Klaksvík: Eydna Thomsen, Ragnar Joensen, Edna R. Steinberg, Jensa Anthoniussen og Maria Thorsteinsson
- Árnafjørður: Guttorm F. Pállson, Theodor A. Olsen og Charlotta Thorsteinsson
- Svínoy: Hanna Jacobsen, Petur Danielsen og Óli á Geilini
- Syðradalur/Húsar: Fríða Isaksen, Gudrun Bláskor og Elin Syderbø
- Mikladalur/Trøllanes: Danial Eliassen, Anja Eliassen og Herfrí J. Sørensen

Tá kommunustýrið skal velja millum fleiri, er ásett, at hetta fer fram sum lutfalsval, men í vegleiðingini til lógarkunngerðina er tó viðmerkt, at onki er til hindurs fyri, at valt kann verða í felag, um semja er um tað.

Lógargrundarlag:
§ 19, stk. 3 í Lovbekendtgørelse nr. 41 af 15. januar 2020 af lov om folketingsvalg på Færøerne:
Blandt valgstyrerne vælger kommunalbestyrelsen en formand for valgstyrerne for hvert valgdistrikt i kommunen. Formændene vælges ved forholdstalsvalg under eet.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at velja forkvinnu/-mann í hvørt *fólkatingsvalstaðið* sær.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Einmælt samtykt at velja Eydnu Thomsen til forkvinnu fyri fólkatingsvalstaðið Klaksvík, Guttorm F. Pállson til formann fyri fólkatingsvalstaðið Árnafjørð, Hannu Jacobsen til forkvinnu fyri fólkatingsvalstaðið Svínoy, Fríðu Isaksen til forkvinnu fyri fólkatingsvalstaðið Syðradalur/Húsar og Herfrí J. Sørensen til forkvinnu fyri fólkatingsvalstaðið Mikladalur/Trøllanes.

16/21
19/00950-42 Uppfylgjan av byggisamtyktarbeiðnum fyri Svínoy

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Svínoyarnevndin	15.02.2021	4/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	15.02.2021	14/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	16/21

Frágreiðing um málið:
Víst verður til samtykt frá síðsta fundi hjá SvíN 21. september 2020 um, at fyrisitingin viðger økispartarnar B23 og D40 av nýggjum. Viðmerkingarnar vóru:

- B23: *Nevndin mælir til, at neystini vestri á Eiðinum koma at liggja í einum øki fyri seg*.
    - Økið er í staðin blivið uppdeilt til vinnuøki B23, nýtt neystaøki D45 og nýtt havnaøki B25.
- D40: *Nevndin undrast á, at D40 økið fer so langt niðan í bygdina, at sethús koma at liggja í økinum*.
    - Økismarkið fyri D40 er blivið tillagað til einans at umfata neyst, og ásetingin gevur møguleika fyri at nýta neystið sum frítíðarhús. Somuleiðis er eitt nýtt havnaøki B26 gjørt.

Harumframt hevur fyrisitingin gjørt:

- nýggjan økispart C23 fyri minnisvarðan "Dropi í lívsins havi".
- frítíðarøkið F5 er nýtt, og víst verður til skriv frá Garðinum á Stórheygnum.
- allir vegir eru lagdir í eitt øki fyri seg.
- smærri reguleringar í øll økismørk.
- Fyrisitingin hevur peikað á onnur stað at staðseta frítíðarhús o.a.tíl. í mun til áheitanina frá einum borgara. Víst verður til F-økini.

Vísandi til samtykt frá UBN og TN 5. og 7. oktober 2020 um at viðgera umsókn frá Garðinum á Stórheygnum, vil fyrisitingin gera vart við, at ætlanin um frítíðarhús ísbv. raksturin av garðinum hjá Stórheygnum er ein privat verkætlan millum festaran og Búnaðarstovuna. Leikluturin hjá kommununi er at skipa viðurskiftini viðv. byggisamtyktini, og hareftir má ætlanin rúmast innan byggisamtyktina.
Í hesum sambandi hevur fyrisitingin mett, at tað kann vera sera heppið fyri oynna, at privatir aktørar eru til reiðar at fremja eina slíka ætlan. Tí leggur fyrisitingin upp at gera eitt F-øki (F5), ið kann rúma frítíðarhús.

Búnaðarstovan hevur eftirspurt, hvat status er, og nær ein byggisamtykt fyri Svínoy fyriliggur, tí tey hava umsóknir liggjandi, ið ikki kunnu blíva viðgjørdar, fyrr enn ein góðkend byggisamtykt er fyri Svínoy.

Tekniska fyrisiting metir, at byggisamtyktaruppskotið er búgvið til alment eftirlit. Og farast kann undir tilgongdina við almennari framløgu og síðan góðkenning frá Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri nevnd til umrøðu og støðutakan

Svínoyarnevndin 15. februar 2021:
Nevndin tekur undir við nýggju byggisamtyktini fyri Svínoy

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. februar 2021:
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 15-02-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá UBN 15. feb. 2021 einmælt samtykt.

17/21
21/00192-3 Fyrispurningur um sundurbýti av matr.nr. 1580 í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	15.02.2021	12/21
2 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	17/21

Frágreiðing um málið:
Matr.nr. 1580 við Heygaveg 30 er 533 m^2 til víddar. Eigarin søkir nú um loyvi at sundurmatrikulera ognina í tveir lutir á 267 m^2.

Byggisamtyktarliga er onki til hindurs fyri sundurbýtinum. Ognin liggur í økisparti A10 við áseting um minsta mark grundøki uppá 200 m^2. - (Økispartur A10 litaður reyður og matr.nr. 1580 litað violett á myndini niðanfyri)



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert viðmælandi partur

Tilmæli:
Við tað, at umsóknin er í tráð við ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, og ætlaði frábýtti luturin liggur upp at almennum vegi (Skarðsvegi), mælir Tekniska Fyrisiting til at viðmæla sundurbýti sambært umsókn.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. februar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá UBN 15. feb. 2021 einmælt samtykt.

18/21
21/00047-9 Stuðul til dokumentarsending um Læknastríðið - SaxoFilm

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	16.02.2021	13/21
2 Fíggjarnevndin	23.02.2021	18/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	18/21

Frágreiðing um málið:
Nærri verður greitt frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 4. februar 2021.
Seint á heysti í 2020 vendu umboð frá SaxoFilm sær til borgarstjóran við hugskoti um at fáa gjørt eina dokumentarsending um Læknastríðið. Tey høvdu fingið samband við ymisk fólk, sum vistu um serstøku hendingina í Klaksvík í 1953-56.

Kunnandi fundur var 8. desember 2020 fyri byráðslimum og umsitingini. Býráðslimir hildu hugskotið kring Læknastríðið við eini dokumentarsending um hesa rættiliga serstøku lokalsøgu vera áhugavert. Tað varð hildið kærkomið, at yrkisfólk bjóðaðu seg fram, tí tað hevur ofta verið upp á tal at fáa eitt savn um Læknastríðið við myndum og lutum, sum greiddi frá hesi serligu søgu.

Ætlanin hjá SaxoFilm er at gera eina domumentarrød í fýra pørtum til danskt og føroyskt sjónvarp – og gera teir samstundis eina stytta versión til savns- og skúlabrúks.

Kostnaðarmeting
Mett verður, at verkætlanin kostar um 1,2 mill., og er ætlanin at søkja ymsar grunnar um stuðul. Men tað er umráðandi fyri SaxoFilm og verkætlanina, at Klaksvíkar kommuna vísir henni áhuga og stuðul. Tí er í fyrstu syftu eitt ætlanarskriv send teimum eftir kunnandi fundin.
Tað hevur verið uppá tal, at heppið hevði verið at kunna stuðla dokumentarsendingini við kr. 3-400.000,-.

Fíggjarviðurskifti
Tá ið talan er um so stóra upphædd, verður hon serskilt at seta av til endamálið, ella hon verður játtað av tøkum peningi. Sum skilst, er ætlanin at umraðfesta verandi fíggjarætlan fyri 2021. Um so verður, hevði verið skilagott at fingið sett av serskilt til endamálið.

Tíðarætlan
Gongst eftir ætlan, skal dokumentarsendingin vera í fýra pørtum og vera liðug seint út á heysti 2021.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Neyðugt verður at seta av serskilt til endamálið.
Peningur kundi verið játtaður av tøkum peningi (*eykajáttan, sum skal fyri tvær ferðir*), ella peningurin verður játtaður í sambandi við umraðfesting av verandi fíggjarætlan fyri 2021.

Tilmæli:
Mælt verður til:

1. Veitt verður tilsøgn um stuðul á kr. 400.000,- sum stuðul til verkætlanina, og fellur peningurin til gjaldingar, tá ið verkætlanin er liðug – seint í 2021.
2. Peningur verður settur av serskilt til endamálið á verandi fíggjarætlan – "Dokumentar-sending – Læknastríðið".
3. Peningurin verður játtaður av tøkum peningi ella í sambandi við umraðfesting av verandi fíggjarætlan.
4. Tilsøgnin um stuðul stendur við til 31. des. 2021 – og verður at søkja um møguliga leingjan av freistini, um sendingin ikki er liðug tá.

Mentanarnevndin 16. februar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 04-02-2021 og mælir til, at kommunan stendur við ætlanarskriv frá í fjør og játtar kr. 400.000,- til endamálið, kr. 200.000 í ár og kr. 200.000 í 2022. Parturin í ár verður tikin upp í samband við umraðfesting av fíggjarætlanini fyri 2021 og verður í fyrsta lagi útgoldin, tá verkætlanin er liðug.

Fíggjarnevndin 23. februar 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 16-02-2021, men at upphæddin samlað verður 300.000 kr., 150.000 kr. í 2021 og 150.000 kr. í 2022.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá FíN 23. feb. 2021 einmælt samtykt.

20/21
16/00196-102 Spæliland - annullering av sáttmála við arbeiðstakara

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	15.02.2021	10/21
2 Mentanarnevndin	16.02.2021	15/21
3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	16.02.2021	15/21
4 Fíggjarnevndin	23.02.2021	21/21
5 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	20/21

Frágreiðing um málið:
Í samband við at nýtt býráð er valt fyri Klaksvíkar kommunu, er avgerð tikin um at útseta verkætlanina Spælilandið og í staðin raðfesta at fáa gjørt eina fimleikahøll til ítróttin.

Sáttmáli er undirskrivaður við Norðhús, og bleiv arbeiðið sett í gongd um miðjan desembur. Arbeiðið er í samráð við borgarstjóran steðgað.

Fyri at staðfesta umraðfestingina krevst, at býráð og nevndir viðgera málið og heimila teknisku fyrisiting at samráðast við arbeiðstakaran um annullering av sáttmála.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
ABF06

Fíggjarligar avleiðingar:
Játtan er tøk, men kann væntast, at afturgerð av framda arbeiðnum kemur at kosta kommununi á leið kr. 600.000.

Tilmæli:
Málið verður latið nevndini til viðgerðar og støðutakan

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. februar 2021:
Ein meiriluti, GvK, OáL og ASB, tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-02-2021.
Ein minniluti, JS og SVJ, tekur støðu í býráðnum.

Mentanarnevndin 16. februar 2021:
Ein meiriluti, JC, GVK og ASB, tekur undir við meirilutanum í UBN, 15-02-2021.
Ein minniluti, SVJ og AJ, tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 16. februar 2021:
Ein meiriluti í nevndini, EyÓP, JC og ASB, tekur undir við meirilutanum í UBN 15-02-2021 og MeN 16-02-2021.
Ein minniluti í nevndini, JS og TJL, tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 23. februar 2021:
Ein meiriluti, ASJ, OáL og KHJ, tekur undir við meirilutanum í B&U 16-02-2021.
TJL og JS taka støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælini í UBN 15. feb., MeN og B&U 16. feb. og FíN 23. feb. 2021; tey vórðu samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB) og 2 atkvøðum ímóti (TJL og JS). Tvey atkvøddu ikki (SVJ og AJ).

21/21
14/00763-51 Liðugtgerð av vælveruøki í Klaksvíkar Svimjihøll

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	16.02.2021	10/21
2 Fíggjarnevndin	23.02.2021	12/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	21/21

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 5. februar 2021.

Vælveruøkið í Klaksvíkar Svimjihøll læt upp á heysti í 2018, og frá fyrsta degi hevur stór undirtøka verið fyri tí. Líka síðan vælveruøkið læt upp, hevur tó eisini verið greitt, at økið hevði riggað betur, um tað varð útbygt nakað.
Leiðarin fyri Klaksvíkar Ítróttardepil hevur heintað tilboð inn frá veitarum til arbeiðið, sum starvsfólk á ítróttardeplinum eisini vera partur av. Innkomnu prísirnir eru uttan mvg. kr. 1.575.331



Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
1.000.000 kr. er avsettar á verandi fíggjarætlan hjá Klaksvíkar kommunu til vælveruøkið. Ein partur av verkætlanini, fyri at hava nóg mikið av streymi og í líka stóran mun at umvæla verandi svimjihøll, er, at høvuðstalvan verður høvuðsumvæld. Hesin kostnaður er góðar 300.000, sum kunnu verða fíggjaðar umvegis raksturin av svimjihøllini. Til at fremja arbeiðið resta sostatt 250.000 í, sum mælt verður til at flyta millum verkætlanir frá *spæliland* til *vælveruøki*.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka undir við, at arbeiðið verður framt eftir omanfyri lýsta leisti.

Mentanarnevndin 16. februar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-02-2021.

Fíggjarnevndin 23. februar 2021:
Nevndin tekur undir við MeN 16-02-202.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá FíN 23. feb. 2021 einmælt samtykt.

23/21
18/00229-56 Jústabrekka 1 leigast út til AV, meirkostnaður umvæling - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	15.02.2021	27/21
2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	16.02.2021	8/21
3 Tekniska Nevnd	17.02.2021	15/21
4 Fíggjarnevndin	23.02.2021	19/21
5 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	23/21
6 Klaksvíkar Býráð	25.03.2021	

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini 3. februar 2021.

Í fjør varð samtykt av nevndum og býráð, at kommunan skuldi bera kostnaðin av at heildarumvæla gomlu politistøðina við Jústabrekku 1 til leiguendamál til brúkarar undir Almannaverkinum. Í samtykt býráðsins liggur, at kostnaðurin av hesi heildarumvæling skal fíggjast við lántøku.

Hóast hesa dagføring í november í fjør vísir tað seg nú, at samlaði kostnaðurin av hesi heildarumvæling verður enn hægri – tí henda viðgerð. Dagførda metingin av umbyggingini nú uml. 5.035.000 kr., tvs. 434.000 kr. hægri, enn samtykt í november.

Lógargrundarlag:
Í hesum føri velur kommunan at brúka ein av sínum bygningum til útleigan til Almannaverkið, sum fer at brúka hann til bústaðaendamál til serligan tørv. Talan er ikki um nakað av beinleiðis lógarásettu heimildum kommununnar, og heimildin fyri kommununnar leikluti í hesum máli liggur sostatt í kommunufulltrúini, vísandi til almannagagnliga endamálið, og at Almannaverkið leigar bústaðirnar í bygninginum víðari eftir einum nærri skipaðum leisti og upptøku.

Fíggjarligar avleiðingar:
Við tí fortreyt, at fyriliggjandi kostnaður heldur, er nú talan um ein ikki áður samtyktan meirkostnað á umleið 435.000 kr. ella samanlagt ein kostnað á umleið 5.035.000 kr., sum kommunan verður at góðkenna og samtykkja at fíggja við lántøku.

Tilmæli:
Vísandi til fyriliggjandi dagførdu kostnaðarmeting av umbyggingini á uml. 5.035.000 kr. ella 434.000 kr. hægri enn samtykt í november, verður málið við hesum lagt fyri avvarðandi nevndir, fíggjarnevndina og býráðið til staðfesting av fyriliggjandi meirkostnaði og samtykt av neyðugari víðkan av lániheimildini til fígging av hesum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 15. februar 2021:
Nevndin staðfestir meirkostnaðin á kr. 435.000 og tekur undir við eini víðkan av lániheimildini.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 16. februar 2021:
Nevndin tekur undir við UBN dagf. 15-02-2021

Tekniska Nevnd 17. februar 2021:
Nevndin tekur undir við E&B 16-02-2021.

Fíggjarnevndin 23. februar 2021:
Nevndin tekur undir við TN 17-02-2021.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá FíN 23. feb. 2021 einmælt samtykt.

24/21
21/00009-11 Stovnseting og val av Heilsunevnd sum undirnevnd – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	18.01.2021	8/21
2 Havna- og Vinnunevndin	18.01.2021	5/21
3 Mentanarnevndin	19.01.2021	7/21
4 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.01.2021	9/21
5 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	19.01.2021	5/21
6 Tekniska Nevnd	20.01.2021	5/21
7 Fíggjarnevndin	26.01.2021	4/21
8 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	4/21
9 Fíggjarnevndin	23.02.2021	20/21
10 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	24/21

Frágreiðing um málið:
Hetta mál varð sum kunnugt lagt fyri nevndir og býráð í januar fundarumfarinum. Í samráð við býráðsmeirilutan verður málið við hesum, umvegis Fíggjarnevndina, lagt fyri býráðið til seinnu samtykt við nøkrum nágreiningum og tillagingum.

Undirnevnd hjá øllum býráðsnevndum
Í fyrru viðgerðini av málinum varð lagt upp til, at Heilsunevndin verður undirnevnd hjá býráðsnevndunum E&B og UBN, tó við tí ískoyti at "*sum tað framgongur í yvirlitinum yvir málsøki hjá Heilsunevndini, so røkka fleiri av hesum eisini inn í aðrar býráðsnevndir enn tær omanfyrinevndu, og verða málini tá eisini at leggja fyri viðkomandi nevndir ella at fremja í samstarvi og við góðari fatan frá viðkomandi pørtum*".

Sostatt er greitt, at Heilsunevndin í veruleikanum fer at virka sum ráðgevandi undirnevnd hjá øllum býráðsnevndum, sum varða av viðkomandi økjum.

Lógargrundarlag:
Sum víst á undir fyrru viðgerðini, fyriliggur eitt notat frá løgfrøðingi í málinum, har víst verður á, at hann ikki metir, at kommunustýrislógin leggur bindingar, sum forða fyri, at ein undirnevnd er tað hjá fleiri býráðsnevndum, og har hann heldur ikki dugir at at síggja, hvat fortreð ein undirnevnd, sum ger tilmæli til meira enn eina nevnd, kann gera, tá hon ongar tilmælandi heimildir fær móti býráðnum.

- - -

Yvirskipaða endamálið og uppgávan hjá Heilsunevndini:
Í fyrru viðgerðini av málinum varð yvirskipaða orðingin av uppgávuni hjá Heilsunevndini:
"Heilsunevndin skal skapa góðar vanar og heilsufremjandi átøk fyri allar borgarar í Klaksvíkar kommunu. Nevndin skal í so stóran mun, sum tilber, brúka serkøn, sum búgva í kommununi, at hjálpa og viðvirka til at føra verkætlanirnar á mál."

Mælt verður til at leggja hesar orðingar afturat:
"Heilsunevndin hevur sum endamál at skapa góðar karmar fyri likamligari og sálarligari heilsu borgarunum at frama. Heilsunevndin skal eisini taka atlit til umhvørvið og arbeiða eftir einum grønum leisti. Hesum kemur Heilsunevndin at virka fyri umvegis allar avvarðandi býráðsnevndir."

Fíggjarligar avleiðingar:
Heilsunevndini verður heimilað, umvegis avvarðandi býráðsnevndir, at mæla til at seta arbeiðsbólkar at lýsa og útgreina ávís evni og verkætlanir innan uppgávuøki nevndarinnar.

Heilsunevndin fer at fáa eina játtan á fíggjarætlan býráðsins til fígging av virkseminum hjá nevndini.

Nevndarlimirnir í Heilsunevndini fáa ikki fasta nevndarsamsýning, men verða løntir pr. fund, har nevndarforkvinnan fær dupulta samsýning í viðurlag fyri eyka uppgávurnar sum forkvinna at fyrireika fundirnar. Nevndin fer ætlandi at hava fund, tá regluligu fundarumførini eru.
- - -
Royndarskipan og eftirmeting:
Heilsunevndin verður sett á stovn við seinnu býráðssamtykt í februar mánað, tá ið nevndarlimirnir eisini verða valdir.

Heilsunevndin verður síðan roynd í verki, og um 6-12 mánaðar verður ein eftirmeting av hesi skipan gjørd og løgd fyri nevndir og býráð. Í hesum arbeiði kann eisini arbeiðast við møguleikanum at víðka ábyrgdar- og uppgávuøkið hjá E&B til eisini at fevna um heilsuøkið.

Tilmæli:
Við støði í fyrru býráðssamtykt 28. januar 2021 verður málið um stovnsetan av Heilsunevnd við hesum lagt fyri við tilmæli um seinnu býráðssamtykt við teimum í hesum tilmæli ásettu tillagingum. Samstundis verður mælt býráðnum til at velja limirnar í Heilsunevndina.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 18. januar 2021:
Ein meiriluti, GvK, OáL og ASB, tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-01-2021.
Ein minniluti, JS og SVJ, mælir til, at Heilsunevndin verður ein sjálvstøðug nevnd við egnari játtan, har m.a. *Sjóhitin* verður lagdur í.

Havna- og Vinnunevndin 18. januar 2021:
Ein meiriluti, ASJ, EÓP, OáL og AJ, tekur undir við meirilutanum í UBN, dagf. 18-01-2021
Ein minniluti, TJL, tekur undir við minnilutanum í UBN, dagf. 18-01-2021.

Mentanarnevndin 19. januar 2021:
Ein meiriluti, JCC, ASB og GvK, tekur undir við meirilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021.
Ein minniluti, SVJ, tekur undir við minnilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021.
Ein annar minniluti, ADJ, tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. januar 2021:
Ein meiriluti í nevndini, Eyðstein Ó. Poulsen, Jóhanna Christiansen og Annika Biskopstø, tekur undir við meirilutanum í UBN 18-01-2021, HaVN 18-01-2021 og MeN 19-01-2021.
Ein minniluti í nevndini, Tummas J. Lervig og Jógvan Skorheim, tekur undir við minnilutanum í UBN 18-01-2021, HaVN 18-01-2021 og minnilutanum SVJ í MeN.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. januar 2021:
Ein meiriluti í nevndini, Annika Biskopstø, Jóhanna Christiansen og Gunvá við Keldu, tekur undir við meirilutanum í UBN 18-01-2021, HaVN 18-01-2021, MeN 19-01-2021 og TrN B&U 19-01-2021.
Ein minniluti í nevndini, Signhild V. Johannesen, tekur undir við minnilutanum í UBN 18-01-2021, HaVN 18-01-2021, minnilutanum Signhild V. Johannesen í MeN og minnilutanum í TrN B&U.
Ein minniluti í nevndini, Andreas Josephsen, tekur støðu í býráðnum.

Tekniska Nevnd 20. januar 2021:
Ein meiriluti, OáL, ASJ og EÓP, tekur undir við meirilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021, og MeN, B&U og E&B 19-01-2021.
Ein minniluti, TJL, tekur undir við minnilutunum í HaVN 18-01-2021 og B&U 19-01-2021.
Andreas D. Josephsen tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við meirilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021, MeN, B&U og E&B 19-01-2021 og TN 20-01-2021.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við minnilutunum í UBN og HaVN 18-01-2021, MeN, B&U og E&B 19-01-2021 og TN 20-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Atkvøtt varð um minnilutauppskotini frá UBN og HaVN 18-01-2021, MeN, B&U og E&B 19-01-2021 og TN 20-01-2021; tey fullu við 4 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL og AJ) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB).

Síðani varð atkvøtt um meirilutauppskotini frá UBN og HaVN 18-01-2021, MeN, B&U og E&B 19-01-2021 og TN 20-01-2021; tey vórðu samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB), 0 atkvøðum ímóti, og 4 blonkum atkvøðum (JS, SVJ, TJL og AJ).

Fíggjarnevndin 23. februar 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-02-2021.
Ein minniluti, TJL og JS, halda fast við minnilutaviðtøkuna hjá FíN 26. jan. 2021.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 23. feb. 2021; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB) og 4 atkvøðum ímóti (JS, SVJ, TJL og AJ).

Í nevndina vórðu valdar Annika S. Biskopstø, Signhild V. Johannesen og Gunvá við Keldu.

25/21
21/00152-1 Broyting í kommunustýrisskipanini - rakstrarstaðið "Frítíðarskúlin (Snjallabjalla)" flytast frá FíN til B&U – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.01.2021	3/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	5/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	25/21

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. januar 2021.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá BýR 28. jan. 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

26/21
20/00840-79 Flyta játtan til stuðulskonturnar á trivnaðarøkinum – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.01.2021	4/21
2 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	19.01.2021	4/21
3 Fíggjarnevndin	26.01.2021	5/21
4 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	8/21
5 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	26/21

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. januar 2021.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 27-12-2020. Jógvan Skorheim luttók ikki í samtyktini.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 19. januar 2021:
Nevndin tekur undir við TrN B&U 19-01-2021

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við E&B 19-01-2021.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá BýR 28. jan. 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

27/21
17/01446-7 Talgildu Føroyar - Klaksvíkar kommuna gerast samstarvsfelagi? – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.01.2021	8/21
2 Klaksvíkar Býráð	28.01.2021	9/21
3 Klaksvíkar Býráð	25.02.2021	27/21

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. januar 2021.

Fíggjarnevndin 26. januar 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-01-2021, og at goldið verður yvir tvey ár. Fíggingin verður at avgreiða við eykajáttan.

Klaksvíkar Býráð 28. januar 2021:
Tilmælið frá FíN 26. januar 2021 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 25. februar 2021:
Tilmælið frá BýR 28. jan. 2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.